# B68 málmaðurin farin av landinum

**Enn er ikki greitt, um illa sperda B68 fer at finna nýggjan málverja, ella um teir fara at dúva upp á teir, sum frammanundan eru á Svangaskarði**

B68 MÁLVERJIN FARIN
*Jóannes Hansen*

Tað stendur einki til á Svangaskarði. Eftir at B68 varð útsligið úr steypakappingini hava teir spælt tvær ferðir 90 minuttir í landskappingini. Teir hava tapt báðar ferðirnar, og teir hava ikki skorað.

Nógvir av stuðulsspælarunum frá í fjør eru burtur, og nú hevur íslendski málverjin, Albert Sævarsson, stungið í sekkin. Hann fór til Íslands í gjár, og tað hevur ljóðað, at Grindavík, sum hann spældi við, áðrenn hann kom til Føroya, hevur verið ógvuliga áhugað at fáa hann aftur í málið at standa. Albert og B68 hava FSF góðkendan sáttmála fyri alt hetta árið.

– Av persónligum orsøkum hevur Albert ynskt at sleppa til hús. Tað hava vit játtað honum. Um hann skal spæla fótbólt í Íslandi, so verður tað sjálvandi ein spurningur millum felagið, sum vil hava hann, og okkum. Tað er rætt, at Grindavík hevur spurt seg fyri hjá okkum, men vit hava ikki skrivað nakran sáttmála um at leysgeva Albert, sigur Niclas Davidsen, formaður í B68.

*Hvør skal so verja málið hjá tykkum?*

– Vit høvdu avgjørt ikki roknað við, at vit skuldu hava nýggjan málverja. Vit hava verið stak væl nøgdir við íslendska málverjan. Í løtuni arbeiða vit við, hvussu vit skulu loysa nýggju støðuna. Spurningurin er, um vit skulu finna málverja aðra staðni, ella um vit skulu brúka ein av okkara egnu málverjum, svarar Niclas Davidsen.

Á Svangaskarði er Jacek Przybylski, sum stóran part av síðsta kappingarári vardi GÍ málið og nú verjir B68 málið í 3. deild. Hann býr á Toftum og er komin til Føroya at arbeiða.

Sunnudagin varð Mortan Hansen settur inn í B68 álopið, tá ið tað restaði eitt korter. Í fjør var hann málverji á næstbesta B68 liðnum, og tað er neyvan óhugsandi, at hann kundi fingið møguleikan í málinum á besta liðnum.

### Í hinum endanum

Málverjutrupulleikin er nýggjur á Toftum. Har hava teir aðrar trupulleikar at dragast við. Eftir tvey tey fyrstu umførini er B68 niðast. Teir hava einki stig, og teir hava einki mál fingið. Annan sunnudag skulu teir til Runavíkar, har tað umframt at verða grannauppgerð eisini fer at lukta av botnuppgerð.

– Vit arbeiða við at samanspæla nýtt lið. Eg ivist ikki í, at tað fer at ganga rætta vegin, men tað tekur tíð. Vit eru ikki partur av fjórðingsfinaluni í steypakappingin, so vit hava hesa og næstu viku at fyrireika okkum í.

*Tit hava ikki skorað mál. Hugsa tit um at keypa nýggjan álopsspælara?*

- Vit hava eyguni við okkum og kanna, um tað er møguleiki fyri at styrkja um liðið. Tað er rætt, at tað hevur gingið illa at skjóta mál, men tað er ikki bara sum at siga tað at fáa ein álopsspælara. Allir teir føroysku spælararnir eru upptiknir. Tað vil siga, at vit skulu uttanlands, um vit skulu hava ein nýggjan. Tá ið vit spældu ímóti GÍ, var tað nýggi útlendski álopsspælarin hjá teimum, sum skoraði fyrra málið. Tað kann koma væl við at fáa styrk uttanífrá. Í løtuni dugi eg ikki at siga, um talan verður um nýggjan álopspælara hjá okkum, sigur B68 formaðurin.



*Niclas Davidsen, formaður hjá B68 skal nú út at finna ein nýggjan avloysara fyri íslendiingin Albert, sum hevur verið málverji hjá B68 seinasta ár, og hann hevur vart málið hjá B68 í ár*




ÁRSAÐALFUNDUR

**Boðað verður til ársaðalfund í Ognarfelag Tryggingartakaranna mikudagin 19. mai, kl. 17 á Hotel Føroyum**

Dagsskrá:

1. Frágreiðing frá nevndini um virki felagsins í 2003
2. Framløga av grannskoðaðum ársroknskapi til góðkenningar og hvussu avlop sambært roknskapinum verður nýtt, sí § 29, stk. 3, í viðtøkum felagsins
3. Val av grannskoðarum
4. Møgulig uppskot, ið nevndin, stjórnin ella umboðsfólk ynskja at viðgera
5. Ymiskt

Allir tryggingartakarar í P/F Tryggingarfelagnum Føroyum eru limir í felagnum og hava rætt til at møta á aðalfundunum, men skulu í seinasta lagi 5 dagar frammanundan aðalfundinum skrivliga boða høvuðsskrivstovu felagsins frá luttøku.

Tórshavn, tann 4. mai 2004
Nevndin

OGNARFELAG TRYGGINGARTAKARANNA

Kongabrúgvin · Postsmoga 329 · FO-110 Tórshavn · Tel 345600 · Faks 345601 · tf@trygging.fo · www.trygging.fo




# Føroyingarnir høvdu lítlan og ongan leiklut

**Tá ið FCK spældi OB niður og norður, var Todi Jónsson bert evarska lítla løtu á vøllinum, meðan Jákup á Borg als ikki var á OB listanum**

SUPERLIGAN
*Jóannes Hansen*

Tað varð lagt upp til fyrstu Føroya uppgerðina í superliguni í langa tíð. Men einki spurdist burturúr føroyska dreyminum, tá ið Todi Jónsson og FCK leygardagin vitjaðu OB, sum undan vikuskiftinum hevði boðað frá, at teir fóru at hava Jákup á Borg í fimtan manna hópinum.

Jákup var 16. maðurin á OB listanum, og tað vóru bara hann og eykamálverjin, sum ikki komu á vøllin. Todi Jónsson var á FCK listanum. Tað var ikki fyrrenn í síðsta minutti, at hann kom á vøllin fyri Álvaro Santos. Tá var FCK á odda 4–0, og soleiðis gjørdist úrslitið.

FCK avrikið var sera sannførandi, og ikki minst í álopinum var tyngdin stór. Álvaro Santos legði upp til fyrsta málið, sum miðvallarin Hjalte Bo Nørregaard skoraði. Hjalte B Nørregaard skoraði eisini næsta málið. Uppleggið alt sum tað var átti Jesper Bech, sum hesa ferð var í FCK álopinum saman við Álvaro Santos. Jesper Bech skoraði tvey tey síðstu málini. Harvið staðfesti hann so miriliga, at hann í løtuni verður roknaður sum fremsti álopsspælarin hjá FCK – frammanfyri skadda Zuma, Álvaro Santos, Toda Jónsson og Peter Møller, sum loysti av, tá ið eitt stórt korter var eftir.

14.031 áskoðarar hugdu at í Odense. Teir sóu heimaliðið royna at sprella fyrstu løtuna, og so var tað FCK. Liðini skulu hittast aftur í Odense í hálvfinaluni í steypakappingini í annaðkvøld. Tað kann vera, at OB leygardagin gav skarvin yvir, tá ið FCK hevði fingið fleiri mál, og alt harvið bendi á, at stigini fóru at fara til Keypmannahavnar. Men tað skal broytast rættuliga nógv, um OB í annaðkvøld skal gera nakað sum helst við FCK. 4–0 tapið var tað fyrsta hjá í langa tíð hjá OB, sum frammanundan hevði vunnið níggju heimadystir á rað.

### Fylgja væl við

Millum tey, sum vedda um danskan fótbólt, er FCK vorðið alt størri favorittur at vinna DM. Men Esbjerg skal avgjørt ikki avskrivast. Sunnudagin vunnu teir 2–0 á Viborg. Stadion í Esberg er í løtuni sum eitt byggipláss, men áhugin fyri fótbólti er kortini fyri uppgangandi í Esbjerg. Hesa ferð vóru 8.360 og hugdu at, og tey flestu vóru í góðum hýri.

Øll vóru ikki komin á plássini, tá ið svenski álopsspælarin, Fredrik Berglund, setti hol á, og fram ímóti dystarenda var tað Jan Kristiansen, sum skoraði nógv mál í fjør, ið staðfesti heimasigurin við rimmar langskoti.

Í Brøndby var heimaliðið undir trýsti, tá ið teir seint seinnapartin sunudagin høvdu vitjan av AGF. Gestirnir vóru ongantíð vandamiklir, og Brøndby vann 2–0. Harvið eru tað framvegis trý lið í DM kappingini. Í annaðkvøld skal Brøndby til Aalborg at spæla seinnu hálvfinaluna í steypakappingini. Fyrra uppgerðin endaði mátleys.

### Sær svart út

Eitt skifti í heyst og eisini í vár tóktist tað sum um, at AGF hevði kós ímóti niðurflytingini. Úrtøkan er framvegis einki serlig. Men hon er uppaftur lakari hjá AB og Frem, sum tykjast fáa meiri enn ilt við at bjarga sær í deildini. Eisini hjá Herfølge gongst illa.

Hesa ferð tapti Frem lyklauppgerðina í Farum ímóti FCN 2–1. Hóast Herfølge eisini tapti – FCM fór av Sjællandi við 4–1 sigri – so sær tað rættuliga svart út hjá Frem, sum er seks stig aftanfyri Herfølge, ið er hinumegin strikuna. Sunnudagin skulu Frem og Herfølge dystast.

AB tykist hava mist trúnna uppá, at tað skal bera til at sleppa undan botnplássinum og harvið niðurflytingini. Hesa ferð taptu teir 3–1 í Aalborg, har heimaliðið umframt ímóti steypafinaluni eisini hevur sett kós ímóti fjórða plássinum. Nú er AaB bara tvey stig aftanfyri OB.

# Johan er á veg upp

**Jann Ingi Petersen var á vøllinum alla tíðina, meðan Andrew av Fløtum og Hjalgrím Elttør vórðu skiftir inn, tá ið Fremad Amager legði rygg til stórtap ímóti Johan B. Hansen og Horsens**

DANMARK 1. DEILD
*Jóannes Hansen*

Eftir at teir fyrstu umførini eftir vetrarsteðgin søplaðu sannførandi oddasessin burtur, gongur tað aftur við ein spentar ál hjá Johan B. Hansen og Horsens. Nú tað resta átta umfør, eru teir næstfremst og fimm stig frammanfyri Randers.

Á odda í næstbestu deildini er Silkeborg. Niðurflytararnir vunnu á heimavølli 3–1 á Randers.

Í Horsens vóru fýra føroyskir landsliðsspælarar á vøllinum. Johan B. Hansen var allar 90 minuttirnar í Horsens verjuni. Jann Ingi Petersen var allar 90 minuttirnar á liðnum hjá Fremad Amager. Tá ið tað restaðu fýra minuttir av fyrra umfarinum kom Hjalgrím Elttør inn, og tá ið tað restaði ein hálvur tími, slapp Andrew av Fløtum upp í part.

Horsens legði seg beinanvegin framum. Tá ið minni enn eitt korter var farið, var Horsens framman fyri 2–0, og teir vunnu 4–0.

Vánirnar eru einki serligar fyri, at Christian Høgni Jacobsen skal spæla í næstbestu deildini, um hann fer at halda fram í Vejle, tá ið hann verður komin fyri seg aftur eftir drúgvan skaðasteðg.

Hesa ferð var Vejle í Keypmannahavn, har teir á Eysturbrúgv taptu 2–1 ímóti Skjold. Vejle er triði niðast og harvið á veg ímóti niðurflyting. Brønshøj við 20 og Fremad Amager við 21 stigum eru tey, ið tað verður neyðugt hjá Vejle at taka, um teir skulu sleppa undan niðurflytingini.


J. Broncks gøta 37 · Postsboks 370 · FO-110 Tórshavn
Tlf: 34 59 00 · Fax: 34 59 50 · booking@smyril-line.fo
WWW.SMYRIL-LINE.COM



Bilpakka TILBOÐ Summarið 2004



Bilur + 2 fólk til Danmarkar úr 2.720,-

**Føroyar – Danmark** ella hinvegin
Tórshavn – Hanstholm ella hinvegin

| Lágárstíð | Couchettir | 4-koyggjukamar, inn | 4-koyggjukamar, utt. | 3-koyggjukamar, inn. | 3-koyggjukamar, utt. | 2-koyggjukamar, utt. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Bilur + 2 fólk | 2.720 | 3.200 | - | - | - | 4.320 |
| Bilur + 3 fólk | 3.580 | 4.300 | - | 5.110 | 5.530 | - |
| Bilur + 4 fólk | 4.440 | 5.400 | 6.080 | - | - | - |
| Bilur + 5 fólk | 5.300 | 6.500 | - | - | - | - |

| Háárstíð | Couchettir | 4-koyggjukamar, inn. | 4-koyggjukamar, utt. | 3-koyggjukamar, inn. | 3-koyggjukamar, utt. | 2-koyggjukamar, utt. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Bilur + 2 fólk | 3.720 | 4.160 | - | - | - | 5.800 |
| Bilur + 3 fólk | 4.780 | 5.440 | - | 6.820 | 7.420 | - |
| Bilur + 4 fólk | 5.840 | 6.720 | 7.560 | - | - | - |
| Bilur + 5 fólk | 6.900 | 8.000 | - | - | - | - |

Bilur + 2 fólk til Noregs úr 1.960,-



**Føroyar – Noreg** ella hinvegin
Tórshavn – Bergen ella hinvegin

| Lágárstíð | Couchettir | 4-koyggjukamar, inn. | 4-koyggjukamar, utt. | 3-koyggjukamar, inn. | 3-koyggjukamar, utt. | 2-koyggjukamar, utt. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Bilur + 2 fólk | 1.960 | 2.280 | - | - | - | 2.920 |
| Bilur + 3 fólk | 2.640 | 3.120 | - | 3.600 | 3.840 | - |
| Bilur + 4 fólk | 3.320 | 3.960 | 4.440 | - | - | - |
| Bilur + 5 fólk | 4.000 | 4.800 | - | - | - | - |

| Háárstíð | Couchettir | 4-koyggjukamar, inn. | 4-koyggjukamar, utt. | 3-koyggjukamar, inn. | 3-koyggjukamar, utt. | 2-koyggjukamar, utt. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Bilur + 2 fólk | 2.480 | 2.960 | - | - | - | 3.760 |
| Bilur + 3 fólk | 3.300 | 4.020 | - | 4.620 | 5.100 | - |
| Bilur + 4 fólk | 4.120 | 5.080 | 5.720 | - | - | - |
| Bilur + 5 fólk | 4.940 | 6.140 | - | - | - | - |

Bilur + 2 fólk til Hetlands úr 1.420,-



**Føroyar – Hetland** ella hinvegin
Tórshavn – Lerwick ella hinvegin

| Lágárstíð | Couchettir | 4-koyggjukamar, inn. | 4-koyggjukamar, utt. | 3-koyggjukamar, inn. | 3-koyggjukamar, utt. | 2-koyggjukamar, utt. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Bilur + 2 fólk | 1.420 | 1.710 | - | - | - | 2.240 |
| Bilur + 3 fólk | 1.860 | 2.295 | - | 2.715 | 2.970 | |
| Bilur + 4 fólk | 2.300 | 2.880 | 3.280 | - | - | 3.940 |
| Bilur + 5 fólk | 2.740 | 3.465 | - | - | - | - |

| Háárstíð | Couchettir | 4-koyggjukamar, inn. | 4-koyggjukamar, utt. | 3-koyggjukamar, inn. | 3-koyggjukamar, utt. | 2-koyggjukamar, utt. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Bilur + 2 fólk | 1.880 | 2.240 | - | - | - | 2.900 |
| Bilur + 3 fólk | 2.460 | 3.000 | - | 3.480 | 3.810 | - |
| Bilur + 4 fólk | 3.040 | 3.760 | 4.160 | - | - | 5.080 |
| Bilur + 5 fólk | 3.620 | 4.520 | - | - | - | - |

Bilur + 2 fólk til Íslands úr 2.330,-



**Føroyar – Ísland** ella hinvegin
Tórshavn – Seyðisfjörður ella hinvegin

| Lágárstíð | Couchettir | 4-koyggjukamar, inn. | 4-koyggjukamar, utt. | 3-koyggjukamar, inn. | 3-koyggjukamar, utt. | 2-koyggjukamar, utt. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Bilur + 2 fólk | 2.330 | 2.650 | - | - | - | 3.530 |
| Bilur + 3 fólk | 3.045 | 3.525 | - | 4.185 | 4.545 | - |
| Bilur + 4 fólk | 3.760 | 4.400 | 4.960 | - | - | - |
| Bilur + 5 fólk | 4.475 | 5.275 | - | - | - | - |

| Háárstíð | Couchettir | 4-koyggjukamar, inn. | 4-koyggjukamar, utt. | 3-koyggjukamar, inn. | 3-koyggjukamar, utt. | 2-koyggjukamar, utt. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Bilur + 2 fólk | 3.080 | 3.440 | - | - | - | 4.640 |
| Bilur + 3 fólk | 4.020 | 4.560 | - | 5.460 | 5.940 | - |
| Bilur + 4 fólk | 4.960 | 5.680 | 6.480 | - | - | - |
| Bilur + 5 fólk | 5.900 | 6.800 | - | - | - | - |

Prísirnir í lágárstíð eru galdandi fyri 1 persónbil (upp til 7,0 m longd og 2,5 m hædd) og valda talið av ferðandi annan vegin.
Børn yngri enn 6 ár, ið ikki hava egna koyggju, ferðast ókeypis.

Prísirnir í háárstíð eru galdandi fyri 1 persónbil (upp til 5,0 m longd og 1,9 m hædd) og valda talið av ferðandi annan vegin.
Børn yngri enn 6 ár, ið ikki hava egna koyggju, ferðast ókeypis.

SMYRIL LINE